## Íbúðir til sjúklingar og avvarðandi

Vegleiðing til sjúklingar og teirra avvarðandi, sum halda til í íbúðunum hjá Krabbameinsfelagið Ísland, sum liggja á Rauðarárstig 33 í Reykjavík.

**Ogn og rakstur**
Íbúðirnar eru 8 tilsamans . Seks av teimum eigur Krabbameinsfelagið Ísland og Reyðikrossur Ísland. Landspítalin leigar og rekur íbúðirnar.
Nútímans innbúgv og hentleikar eru í íbúðunum, so sum vaskimaskina, køliskáp við frystiboks, kaffimaskina, køksútbúnaður, dýnur, seingjarklæði, handklæðir, dustsúgvari, sjónvarp, útvarp og tráðleyst internet. Íbúðirnar eru innrættaðar við køki og stovu í einum, wc/ bað, duri, hjúnasong og gestarúmi. Íbúðirnar eru nærhendis Landspítalinum og miðbýnum, tekur uml. 20-30 min. til gongu.

**Búloyvi**
Búloyvi er bert í 8 vikur í einum

**Lyklar**
Sjúklingar og avvarðandi fáa tvey sett av lyklum. Skuldi tað verið, at lykil/ lyklar verða burturmistur, verður tú biðin um, at hava samband við Geisladeildina 10 K á Landspítalið við Hringbraut.

**Royking**
Tað er ikki loyvt, at roykja í íbúðini, úti á altanin, úti á gongini ella í bilskýlunum .

**Kelidýr**
Tað er ikki loyvt, at hava kelidýr í íbúðini

**Vindeygur og vatnkranar**
Minst til, at kanna um vindeygu eru afturlatin, og at skrúva er fyri vatninum, áðrenn farið verur til songar, ella burtur frá húsum.

**Rudding**
Áðrenn heimferð skal íbúðin vera ruddilig. Seingjarklæðini skulu takast av, og frystiskápið tømast .

**Gestasong**
Gestasong er í íbúðini. Tað er ikki loyvt, at sova í stovuni.

**Telefon**
Ein telefon er í hvørjari íbúð. Telefonin, kann bert nýtast, at ringja innanlendis. Tað ber ikki til, at ringja til eina fartelefon.

**Posta**
Í gongini eru postkassar, sum eru talmerktir ( nummerere) hvørjari íbúð.

**Ravmagn**
Sløkkið á útvarpi, sjónvarpi, áðrenn farið verður til songar, ella burtur frá húsum.

**Skaði**
Áðrenn heimferð, verður ynskt eftir, at boða verður frá, um borðbúnaður hevur brotnað, ella um skaði er á innbúgv. (Somuleiðis skal siga frá, um ein ljóspera er farin o.s.fr.). Ikki er tørvur á, at gjalda fyri skaðan á borðbúnað ella innbúgv.

**Upplýsingar**
Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Geisladeildina 10 K á Landspitalið við Hringbraut.

Tlf.: 543 6800 ella tlf.:543 6801. Aftan á afturlatingartíð kann ringjast til 543 1800 (Trygdarvørðum á Landspítala).

**Telefonnummar:**
Íbúð 201: 562 0415
Íbúð 202: 562 0416
Íbúð 203: 562 0077
Íbúð 204: 562 6415
Íbúð 205: 562 4856
Íbúð 206: 562 0418
Íbúð 207: 562 2207
Íbúð 208: 562 6419

**Er tørvur á læknahjálp**
Er tað okkurt heilt AKUTT, og tú metir, at best er at ringja eftir sjúkrabili beinanvegin, ring so 112

Er tørvur á læknahjálp um dagin, ring so til Landspítalið **tlf: 543 1000** og biðja um at fáa samband við hjálparlæknan á tí ávístu deildini, ella til Bráðfeingisdeildina í Fossvogi tlf: **543 2050/ 2051**

**Er törvur** á læknahjálp( aftan á afturlatingartíð)kann ringjast til læknavaktin
Smáratorgi 1
201 Kópavogi
**Tlf: 1770**

